# AÐALFUNDUR HJÁ FØROYA HAVBÚNAÐARFELAG

## 2. MAJ 2008

## ÁRSFRÁGREIÐING 2007

Føroya Havbúnaðarfelag

Smærugøta 9A

FO-100 Tórshavn

## Frágreiðing frá nevndini

Føroyska framleiðslan av laksi og sílum fall nógv frá 2003 fram til 2006. Frá 56.000 tonsum, tá framleiðslan var størst, heilt niður á 18.000 tons í 2006. Í 2007 vaks framleiðslan aftur og samlaða tøkan var omanfyri 30.000 tons. Í 2008 verður roknað við, at framleiðslan fer at økja aftur til umleið 40.000 tons. Karmarnir um alivinnuna eru yvirhøvur góðir og vinnan hevur seinasta árið víst nøkur góð úrslit, tá tað kemur til vøkstur, felli og eingir sjúkutilburðir hava verið. Saman við nøktandi marknaðarprísum hevur hetta gjørt, at alivinnan hevur havt hampuliga góð úrslit í 2006 og 2007.

Roknað verður við, at útboðið av laksi á marknaðinum í Evropa í 2008, eins í 2007 fer at økjast. Hetta fer óivað at trýsta marknaðarprísin. Alisøgan sigur frá, at prísurin sveiggjar sera nógv, men um føroyska vinnan megnar at hava ein burðardyggan rakstur og fyribyrgja sjúku, skuldi alivinnan klára at liva við teimum príssveiggjum, sum fara koma.

Í 2007 vórðu 9 mió. fiskar settir á sjógv og roknað verður við, at millum 9 og 10 mió. fiskar verða settir út í 2008. Í 2009 verður roknað við, at millum 10 og 11 mió verða sett á sjógv.

Vøksturin í framleiðsluni komandi árini fer at geva vinnuni avbjóðingar, men nevndin í Havbúnaðarfelagnum er sannførd um, at vinnan í størri mun enn fyrr er før fyri at taka hesar avbjóðingar.

Týdningarmestu málini, sum nevndin í Havbúnaðarfelagnum hevur arbeitt við í 2007 er m.a. luttøka í arbeiðsbólki, sum endurskoðar alilóggávuna. Hetta arbeiðið er ikki liðugt enn. Kunngerðin um fyribyrgjandi rakstur er framvegis undir endurskoðan. Havbúnaðarfelagið hevur havt kunngerðina til hoyringar nakrar ferðir og felagið roknar við, at kunngerðin kemur aftur til hoyringar í næstum. Í rakstrarkunngerðin verður ásett, at alivinnan skal rapporterað inn til myndugleikarnar elektroniskt. Hetta krav hevur havt við sær, at Havbúnaðar-felagið í 2007 heitti á Maritec um at gera eitt dátuútflytingarmodul til Farm

Control, soleiðis at nú ber til hjá vinnuni at senda hesar upplýsingar beinleiðis frá framleiðsluskrásetingarskipanini sum vinnan brúkar.

Í 2007 setti Havbúnaðarfelagið í verk eina kanning av rognaveitarum í Noregi, Íslandi og Skotlandi. Nevndin í Havbúnaðarfelagnum metir, at eitt tað veikasta liðið í føroysku sjúkutilbúgvingini eru rognini. Rogn verða innflutt og eingi serlig krøv verða sett, tá tað kemur til sjúku. Felagið ber ótta fyri at sjúka kann verða innflutt til Føroya við rognum. Stórir trupulleikar eru við m.a. PD og HSMB í grannalondunum og vilja vit ikki fáa hesar sjúkur hendavegin. Arbeiðsbólkurin, sum kannaði hetta, hevur latið Havbúnaðarfelagnum eina frágreiðing um sjúkustatus og genetiska støði á rognum úr grannalondunum.

Í februar í 2007 skipaði felagið fyri einum tiltaki fyri starvsfólki í alivinnuni. Tiltakið var væleydnað og stór undirtøka var. Í februar í ár skipaði felagið aftur fyri aliráðstevnu og aftur í ár var undirtøkan stór. Slík tiltøk heldur nevndin hava alstóran týdning og ein av uppgávunum, sum felagið eigur at átaka sær, við tí endamálið at økja um førleikan í vinnuni.

Sum kjakast var um á seinasta aðalfundi, hevur Havbúnaðarfelagið havt ein meira virknan leiklut í altjóða høpi. Havbúnaðarfelagið er limur í FEAP, og hevur nevndin avgjørt at størri orka skal leggjast í hetta samstarvið.

Í 2007 fekk føroyska alivinnan skriv frá ES um áhugi var fyri at taka uppaftur málið viðv dumping av sílum á ES marknaðinum. Av tí at framleiðslan av sílum er munandi minkað seinnu árini var áhugin fyri at taka málið uppaftur sera lítil. Hetta mál fer sannlíkt at vera tikið uppaftur í 2008, tí tá eru fimm ár liðin síðan strafftollurin varð ásettur.

Ein av avbjóðingunum fyri framtíðina er at arbeiða framímóti, at føroyskur laksur skal verða av allar bestu góðsku. M.a. er frástøðan til marknaðin og títtleikin í fráferðunum hjá farmaskipum úr Føroyum ikki er nóg góður.

# Innihaldsyvirlit

**1. ENDAMÁL FØROYA HAVBÚNAÐARFELAGS ....... 4**

**2. ALMENT UM GONGDINA INNAN ALIVINNUNA ....... 5**

2.1 FRAMLEIÐSLA ....... 6
2.2 ÚTFLUTNINGUR ....... 7
2.3 PRÍSIR ....... 8
2.4 BÝTIÐ AV ÚTFLUTNINGI ....... 10
2.5 BÝTIÐ SEINASTU FÝRA ÁRINI ....... 11
2.6 ÚTSETING AV SMOLTI ....... 12
2.7 ALING AV TOSKI ....... 12
2.8 ALTJÓÐA ÚTBOÐ ....... 13

**3. VIRKSEMIÐ HJÁ FØROYA HAVBÚNAÐARFELAG Í 2007 ....... 16**

3.1 TALGILD RAPPORTERING TIL HEILSUFRØÐILIGU STARVSSTOVUNA ....... 16
3.2 ROGN OG SJÚKUTRYGD ....... 17
3.3 ENDURSKOÐAN AV ALILÓGGÁVUNI ....... 17
3.4 ALIRÁÐSTEVNA 2007 ....... 18
3.5 SAMANBERING AV UMHVØRVISEFTIRANSINGARSKIPANUM Í FØROYUM, NOREGI OG SKOTLANDI ....... 19
3.6 UPPAFTURTØKA AV DUMPINGMÁLINUM AV SÍLUM ....... 19
3.7 YVIRVØKUÆTLAN FYRI FISKASJÚKUR ....... 21
3.8 ALTJÓÐA SAMSTARV ....... 21
*3.8.1 FEAP ....... 21*
*3.8.2 ISFA ....... 21*
3.9 ÚTBÚGVING OG SKEIÐ ....... 22
*3.9.1 Skeið viðvíkjandi arbeiðstrygd ....... 22*
3.10 OLJUDÁLKING FRÁ OLSHANU ....... 22
3.11 AVTALAN UM SJÚKURAKT ALIBRÚK ....... 23
3.12 LANDSDJÓRALÆKNAEMBÆTIÐ ....... 23
3.13 LÓGGÁVA, SUM ÁVIRKAR ALIVINNUNA ....... 24
*3.13.1 Rakstrarkunngerðin ....... 24*
*3.13.2 Kunngerð um merking av alibrúkum ....... 24*
3.14 GRANSKING OG ALIVINNA ....... 24

## 1. Endamál Føroya Havbúnaðarfelags

Havbúnaðarfelagið er eitt áhugafelag hjá alarum, bæði á sjógvi og á landi. Endamál felagsins er at fremja tey mál, ið eru av felags áhuga fyri limirnar. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av alivinnuni.

Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

Í nevndini í Føroya Havbúnaðarfelag sita:

Ragnar Joensen, formaður

Atli Gregersen, næstformaður

Regin Jacobsen

Bogi Jacobsen

Frímund Hansen

## 2. Alment um gongdina innan alivinnuna

Alivinnan er sum heild væl fyri og úrslitini seinastu árini sera góð. Vinnan er umskipað síðan seinastu kreppuna og útlitini góð. Karmarnir um alivinnuna er góðir og hevur alivinnan ein skynsaman rakstur, har neyv framleiðslustýring er.

Bygt á góðar karmar og nærlagni, er alivinnan í dag burðardygg. Hetta sæst aftur í avrikinum, tí fiskurin veksur sera væl og hevur sera lágt fellið. Saman við nøktandi marknaðarprísum serliga í 2006 og eisini 2007 hevur alivinnan havt nøktandi avkast. Alivinnan er í dag ein framleiðin vinna, sum nú er komin væl upp undanaftur frá kreppuárunum 2002-2005.

Meðan 2006 varð eyðkent fyri, at sera lítið var av fiski, og nøgdin, sum tikin var, var 18.000 tons í livandi vekt, vísir 2007 tekin um eina vinnu, sum er komin fyri seg aftur. Nøgdin av fiski í livandi vekt, sum var tikin í árinum var góð 30.000 tons. Góði marknaðarprísurin, sum var í 2006, helt sær tó ikki í 2007. Samlaða útflutningsvirðið var umleið nærum 700 mió kr.

2007 hevur í allar mátar verið eitt gott ár og sigast kann, at alivinnan hevur staðið royndina, nú nøgdin av fiski í sjónum er munandi økt. Í ár verður mett, at tøkan verður umleið 45.000 tons.

Sum roknað varð við í 2006, øktist útboðið av laksi á evropeiska marknaðinum í 2007 og vinnan merkti trýst á laksaprísinum. Hinvegin kann sigast, at marknaðarprísurin í 2007, tó ongantíð var so lágur, at vinnan hevði trupulleikar av hesum. Alisøgan sigur frá, at prísurin kann sveiggja sera nógv, men roknað verður við, at um alarar hava ein burðardyggan rakstur og fyribyrgja sjúku, skuldi alivinnan megna at liva við teimum príssveiggjum, sum fara at koma.

Við árgangssundurskiljing, økishvíld og sjúkufyribyrgjandi atburði, verður mett at alivinnan hevur karmar fyri burðardyggum rakstri. Sum víst var á seinasta ár, so eru onkur vandamál við verandi støðu. Laksarogn verða framvegis innflutt, og

útvegararnir eru fleiri, so ein ávísur vandi kann verða fyri at sjúka verður innflutt við laksarognum.

130.000 toskayngul vóru sett út um ársskifti 2006/2007. Hesin fiskur er partvíst komin til tøku, og í heyst er allur hesin fiskur tikin. Tá ber til at gera endaliga upp, hvussu henda fyrsta royndin við at ala tosk hevur gingið. Ábendingar eru um, at vøksturin hjá alitoskinum er sera góður. Toskayngul eru aftur klár at verða sett út nú í vár.

## 2.1 Framleiðsla

Framleiðslan í alivinnuni vaks nógv frá 1999 til 2003 fyri síðani at minka nógv fram til 2007. Tá tøkan var størst var hon 56.000 tons í livandi vekt. Orsaka av lágum prísum og ILA-sjúku fall framleiðslan í 2004 til 45.000 tons, í 2005 til 22.000 tons, og í 2006 var hon bert 18.000 tons.

Mynd 1. Tøka av alifiski fram til 2007 og forsøgn fyri 2008 (livandi vekt)




| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 08m |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 0,915 | 1,440 | 1,260 | 3,292 | 1,315 | 3,335 | 11,149 | 10,220 | 5,092 | 4,493 | 5,496 | 7,648 | 7,780 |
| Laksur | 17,663 | 20,306 | 19,176 | 39,252 | 33,508 | 53,557 | 44,954 | 61,630 | 40,985 | 18,962 | 13,078 | 22,305 | 37,230 |

Kelda: Rúni Dam, sp/f Avrik. Forsøgnin fyri 2008 er ein meting

Tøkan í 2006 var tann lægsta síðani undan aldarskiftinum, meðan tøkan í 2007 aftur er komin uppá 30.000 tons. Hagtølini frá 2007 geva ábendingar um, at

alivinnan er komin fyri seg aftur Tøkan av laksi var góð 22.000 tons og tøkan av sílum umleið 7.600 tons í livandi vekt.

Metingin av tøkuni av laksi og sílum í ár, sum er grundað á útsetingar av smolti í 2007, verður mett at fara at vera umleið 45.000 tons. Roknað verður við, at tøkan av laksi og sílum í 2009 og tey næstu árini ferð at vaksa umleið 10% árliga.

Ábendingar eru um, at talið av smoltið, sum verður sett á sjógv í ár, fer at liggja um 10 mió. stk. Við tí bygnaði, sum er í dag í alivinnuni og teimum kørmum, sum eru lagdir, verður roknað við einari støðugari framleiðslu, sum byggir á 10 -11 milliónir smolt árliga.

## 2.2 Útflutningur

Mynd 2. Útflutningur av alifiski í virði frá 1990 til 2007 (1000 kr)




Kelda: Hagstova Føroya

Mynd 2 vísir, at útflutningurin var í hæddini frá 1999 fram til 2003, tá hann táttaði í eina milliard krónur. Síðani er útflutningsvirðið falli niður um hálvu milliardina, fyri síðani at verða farin væl upp um hálvu milliardina aftur í 2007. Í 2006 var útflutningsvirðið í mun til nøgdina sera høgt, tí prísurin á laksi og sílum var sera góður. Prísurin í 2007 hevur verið nakað lægri og á eini meira vanligari legu.

Um marknaðarprísirnar fara at halda sær í 2008 verður roknað við at samlaða útflutningsvirðið frá alivinnuni verður nakað hægri enn í 2007 – kanska einar 800 mió kr.

Útflutningurin er bygdur á eina alivinnu, sum virkar innan fyri sera góðar karmar. Hesir karmar vóru lagdir, meðan alivinnan var í kreppu, og sum vóru við til at fáa áhugan hjá íleggjarum at gera íløgur í alivinnuna. Alarar eru í dag nærlagdir og hava ein skynsaman rakstur, har umhvørvisvernd og sjúkufyribyrging eru sett í hásætið. Útflutningurin er tí bygdur á eina burðardygga alivinnu, har vágin fyri sjúku og vánaligum rakstri er neyvt stýrdur.

Marknaðaratgongd er tó ein avbjóðing. Føroysk alivinnuna hevur tollforðingar í Russlandi og ES hevur seinastu árini ákært Føroyar fyri dumping av sílum. Tað hevur alstóran týdning fyri vinnuna, at føroyskir myndugleikar alsamt arbeiða við og tryggja, at marknaðaratgongdin fyri alifiski er so góð sum gjørligt. Herundir eisini at enduskoða Føroya støðu í mun til ES-limaskap.

### 2.3 Prísir

Marknaðarprísurin hevur stóra ávirkan á avrikið hjá alivinnuni, tí hann sveiggjar sera nógv. Mynd 3 vísir ársmiðalprís á feskum kruvdum laksi frá 1993 til 2006. Sum myndin vísir, eru umleið 6 ár millum prístindar og prísgjáir. Prístindar hava verið í 1994, 2000 og 2006, meðan prísgjáir vóru í 1997 og 2003.

Mynd 3. Ársmiðal prísir á feskum kruvdum laksi. FOB Føroyar




Kelda: Hagstova Føroya

Prísurin á feskum kruvdum laksi var í 2000 góðar 28 kr/kg og fall til 16,35 í 2003. Prísurin hevur síðani hækkað á hvørjum ári til 2007 har hann aftur lækkaði til 24,64 kr í miðal pr. kg.

Mynd 4. Miðalprísur pr. kg. av frystum laksaportiónum.




Kelda: Hagstova Føroya

Mynd 4 vísir miðalprísin á frystum laksaportiónum frá 1996, tá framleiðslan veruliga tók dik á seg fram til 2007. Prísurin á laksaportiónum sveiggjar eisini, men er væl meira støðugur enn prísurin á feskum laksi. Prísurin hevur ligið rættiliga støðugur omanfyri 50 kr/kg, men hevur onkur tíðarskeið dottið líka niður um. Miðalprísurin í 2006 var hægsti nakrantíð nevniliga 68,45 kr/kg. Í 2007 var miðalprísurin 57,78 kr fyri laksaportiónir.

## 2.4 Býtið av útflutningi

Mynd 5 vísir býtið av útflutninginum í virði. Feskur laksur hevur verið sera dominerandi partur av útflutninginum, men í 2006 kom broyting í, tá laksaportiónir vístu seg at eiga stóran part av útflutninginum. Í 2007 táttaði útflutningsvirðið frá alivinnuni í góðar 700 mió kr. Roknað verður við at útflutningsvirðið frá alivinnuni fer at vaksa nakað afturat komandi ár, men hetta valdast sjálvsagt um prísin á alifiski á marknaðinum.

Mynd 5. Útflutningsbýtið av alifiski í virðið




Kelda: Hagstova Føroya

Útflutningsvirðið fall sera nógv frá 2003 til 2006, meðan tað í 2007 aftur vaks munandi. Útflutningsvirðið á laksaportiónum, hevur tó víst seg at vera sera javnt øll árini. Roknað verður við, at útflutningsvirðið fyri laksaportiónir ferð at vaksa nakað afturat komandi ár, tí framleiðsluorkan er vaksin.

## 2.5 Býtið seinastu fýra árini

Niðanfyri er eitt samlað yvirlit fyri útflutningsvirði, nøgd og prísir fyri ymsu vørurnar, sum alivinnan framleiðir. Fráskurður o.a. er ikki við. Tølini eru fyri seinastu fimm árini.

Talva 1. Útflutningsvirði fyri ymsu vørurnar frá 2003 til2007

| | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|
| Frystur laksur | 532.620 | 424.299 | 206.522 | 134.650 | 251.689 |
| Feskur laksur | 39.170 | 69.632 | 53.660 | 32.573 | 54.922 |
| Laksaportiónir | 224.297 | 184.324 | 169.967 | 195.024 | 170.587 |
| Laksur, annað | 8.211 | 6.731 | 9.703 | 12.074 | 10.921 |
| Fesk síl | 4.074 | 447 | 484 | 34.657 | 14.037 |
| Fryst síl | 155.353 | 76.547 | 58.190 | 64.034 | 86.730 |
| Síl, annað | 485 | 372 | 0 | 168 | 0 |
| **Útflutningsvirði tilsamans** | **964.209** | **762.351** | **498.526** | **473.178** | **588.887** |

Kelda: Hagstova Føroya

Talva 2. Útflutningsnøgdin fyri ymsu vørurnar í 1000

| | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 32.581 | 23.312 | 9.330 | 4.514 | 10.217 |
| Frystur laksur | 2.050 | 3.509 | 2.374 | 1.073 | 2.071 |
| Laksaportiónir | 4.423 | 3.870 | 3.104 | 2.849 | 2.953 |
| Laksur, annað | 630 | 479 | 736 | 1.131 | 1.374 |
| Fesk síl | 281 | 21 | 19 | 1.302 | 636 |
| Fryst síl | 7.680 | 3.607 | 2.802 | 2.302 | 3.864 |
| **Tilsamans** | **47.644** | **34.797** | **18.364** | **13.172** | **21.115** |

Kelda: Hagstova Føroya

Talva 3. Miðal útflutningsprísur fyri ymsu vørurnar

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 16,35 | 18,20 | 22,13 | 29,83 | 24,63 |
| Frystur laksur | 19,11 | 19,84 | 22,61 | 30,36 | 26,52 |
| Laksaportiónir | 50,72 | 47,63 | 54,76 | 68,45 | 57,78 |
| Fesk síl | 14,50 | 21,29 | 25,47 | 26,62 | 22,06 |
| Fryst síl | 20,23 | 21,22 | 20,77 | 27,81 | 22,45 |

Kelda: Hagstova Føroya

Sum talvurnar vísa so er bæði nøgdin og útflutningsvirðið av vørum frá alivinnuni voksin seinasta árið. Verður hugt eftir miðalprísinum á ymisku vørunum sæst at miðalprísurin á øllum vørum er fallin nakað í mun til 2006, sum var eitt sera gott ár. Tó er prísurin framvegis á einum slíkum støði, at alivinnan vinnur pening.

## 2.6 Útseting av smolti

Mynd 7 vísir útsetingina av laksi og sílum frá 2000 til 2007 og eina meting fyri 2008 og 2009. Myndin vísir, at útsetingin av fiski, tá hon var uppá tað mesta, var 16 mió. Í 2003 og 2004 fall útsetingin sera nógv orsaka av kreppuni. Í 2005 kvinkaði talið av útsettum fiski nakað uppeftir, og í 2007 kom útsetingin upp um 9 mió. Í ár fara umleið 10 mió. stykkir á sjógv, og í 2009 og næstu árini fram fara millum 10 og 11 mio. á sjógv. Í 2007 vóru omanfyri 2 mió. síl sett út og í 2008 verður talið 1,5 mió. Framskrivingar fyri 2008 vísa at bert 0,5 mió síl verða sett út.

Mynd 7. Útsettur fiskur frá 2000 til 2007 og ein meting av 2008 og 2009




Kelda: Havbúnaðarfelagið

## 2.7 Aling av toski

Farið er undir at ala tosk, og 100.000 yngul fóru á sjógv í fjør, meðan 30.000 stykkir vórðu ald á landi. Framleiðslan er á einum royndarstigi enn, men vónirnar til toskin eru stórar, tí Føroyabankatoskurin hevur frá náttúrunnar hond sera góðar

eginleikar og eitt framúr umdømi á marknaðinum. Tøkan av toskinum, sum er farin á sjógv, verður á várið og heysti 2008, og tá ber til rættiliga at meta, hvussu tað hevur gingist við hesum fyrstu royndunum at ala tosk.

## 2.8 Altjóða útboð

Marknaðarprísurin sveiggjar sera nógv aftur og fram, og orsøkin er samspæli millum útboð og eftirspurning. Útboðið í heiminum hevur lækkað seinastu árini. Hetta hevur viðvirkað til, at prísirnir eru farnir upp. Føroyska alivinnan mátar avrikið eftir, hvussu prísurin á feskum laksi háttar sær á evropeiska marknaðin. Tí er kanska meira skilagott at hyggja eftir, hvussu útboðið hesumegin Atlantshavið er. Útboðið frá 2006 og fram til í fjør er víst í mynd 8 niðanfyri.

Mynd 8. Evropeiskt útboð av laksi




Kelda: Framløga á alidegi 2008.

Útboðið av laksi í 2003 vaks sera nógv, og marknaðarprísurin fyri feskan laks í Evropa fall til tað lægsta nakrantíð. Í 2004 var at kalla eingin vøkstur, og í 2005 var eitt beinleiðis fall í útboðnum. Hetta er ikki hent síðani 1992. Tá marknaðurin alla tíðina veksur, og nýggir marknaðir eru í stórari menning – eitt nú Russland –

viðvirka slík stór sveiggj í útboðið, at prísurin hækkar nógv og var hetta tað, sum føroyska alivinnan var vitni til í 2006. Í 2007 vaks útboðið av laksi í Evropa umleið 9% og framskrivingar vísa, at í 2008 verður vøksturin í útboðnum í Evropa 12% .

Tað gongur væl í alivinnuni í løtuni, og tí kann roknast við, at útboðið av laksi á alheims marknaðunum hækkar. Hetta er bygt á, at tá inntøkan er góð, stimbrar tað verandi alarum at økja um framleiðsluna og nýggjum alarum at koma inn í vinnuna.

Soleiðis, sum gongdin er í løtuni, er ikki vøkstur í alheimsútboðnum, og kemur hetta fyrst og fremst av, at kilenska alivinnan ikki veksur. Væntaða altjóða útboðið er víst í mynd 9 niðanfyri.

Mynd 9. Útboði av laksi í heiminum.




Kelda: Framløga á alidegi 2008.

Ábendingarnar vóru seinasta ár um, at útboðið í ár fór at hækka 14%. Hetta vísti seg tó ikki at halda. Metingarnar fyri 2008 vísa nú, at altjóða útboðið í ár fer at lækka við 7%.

Orsøkin til lækkingina stendst fyrst og fremst av at útboðið av laksi úr Kili er munandi minni enn roknað var við. Kilenska alivinnan hevur stórar avbjóðingar, sum fyrst og fremst komast av sjúku. Tá hesir trupulleikar verða loystir, kann roknast við at kilenska alivinnan aftur fer at veksa, og vakstrarmøguleikarnir í Kili eru sera stórir.

Útboðið hesumegin Atlantshavið fer at vaksa í ár og trýstið á marknaðin í Evropa fer tí at økjast. Evropeiski marknaðurin megnar nokk at svølgja eina størri nøgd enn í dag, men stóri spurningurin er, hvussu marknaðurin í Russlandi fer at mennast. Um tað gongur væl, kann Russland gerast ein týðandi laksamarknaður, men tær forðingar, sum russar seinastu tíðina hava sett fyri m.a. norskum laksi, ger at hesin marknaður er sera óvissur.

## 3. Virksemið hjá Føroya Havbúnaðarfelag í 2007

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini, verða nøkur av teimum málum, sum Føroya Havbúnaðarfelag hevur arbeitt við seinasta árið lýst.

### 3.1 Talgild rapportering til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna

Rakstrarkunngerðin ásetir, at rapportering til fiskasjúkueftirlitið skal verða talgilt. Møguleikarnir alarar hava er antin at inntøppa kravdu upplýsingarnir til HFS yvir eina heimasíðu ella at fáa eina skipan, sum kann senda upplýsingar frá framleiðsluskrásetingarskipan, sum vinnan brúkar, beinleiðis til teldukervi hjá HFS.

Føroya Havbúnaðarfelag er av tí áskoðan, at tað er framtíðarrættað at fáa í lag eina talgilda flyting av dátum og avgjørdi at fáa gjørt eina eksportfílu til hesar upplýsingar. Somuleiðis, fyri at hetta skuldi vera nóg trygt fyri alivinnuna, at ein reglugerð verður gjørd fyri at tryggja, at upplýsingar frá vinnuni ikki flóta frítt og at upplýsingarnar ikki verða misbrúktar á nakran hátt.

Føroya Havbúnaðarfelag gjørdi avtalu við FarmControl um programmering av einum eksportmoduli til FarmControl – hetta kostaði umleið 150.000 kr. Nevndin metir, at tað er rætt at brúka hesar pengar til hetta endamálið, tí tað er av alstórum týdningi, at henda innrapportering ikki verður til ein stóran trupulleika fyri alarar.

Samstundis hevur Føroya Havbúnaðarfelag arbeitt saman við Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um at fáa gjørt ein politikk um, hvussu tølini kunnu brúkast og hvussu trygdin skal skipast. Avtalað er, at eingir upplýsingar frá skipanini skulu almannakunngerast, í fyrsta umfari fram til at endurskoðaða rakstrarkunngerðin er lýst. Endurskoðaða rakstrarkunngerðin hevur ásetingar um almannakunngerðing av upplýsingum frá skipanini. Somuleiðis, at ein nevnd við umboðum frá vinnuni og HFS skal meta um, hvørt tað er í lagi, at almannakunngera upplýsingar. Hesar ásetingar metir nevndin í Havbúnaðarfelagnum verða nøktandi trygd fyri, at upplýsingar, sum vinnan letur, ikki verða misnýttar.

### 3.2 Rogn og sjúkutrygd

Føroya Havbúnaðarfelag hevur í 2007 brúkt nógva orku uppá at fáa kanna sjúku og genetiska status á rognum úr Íslandi, Noregi og Føroyum. Andras Strøm, Hørður Wardum og Marita vóru í Noregi og Skotlandi og vitjaðu SalmoBreed, Aquagen, og Hørður Wardum og Marita á Landcatch. Andras hevði verið har fyrr og metti seg kenna til umstøðurnar har. Seinni vóru Andras og Marita í Íslandi og vitjaðu Stofnfisk.

Havbúnaðarfelagið hevur stór fyrivarni til innflutningin av rognum. Orsøkin er, at tað er ein ávísur vandi at innflyta sjúku við rognum og halda, at tað er týdningarmikið, at innflutningurin er skipaður.

### 3.3 Endurskoðan av alilóggávuni

Vinnumálaráðið setti ein arbeiðsbólk at endurskoða alilóggávuna. Føroya Havbúnaðarfelag útnevndi Maritu Rasmussen at umboða felagið í hesum arbeiðinum. Annars vóru Súni Poulsen frá Búnaðarstovuni, Peter S Østergaard frá Fiskasjúkudeildini á HFS, Bjørn Harlou Landsdjóralækni, Jóhanna Olsen frá Umhvørvisstovuni, Maria Róin og Jóanna Djurhuus frá Vinnumálaráðnum.

Fyrsta málið, sum nevndin tók upp, var um aling á vøtnunum skuldi halda fram ella ikki. Í sambandi við hetta mál, vóru Andras Strøm, djóralækni og Jan Sørensen, lívfrøðingur við í arbeiðinum.

Arbeiðsbólkurin kom til ta niðurstøðu, at aling á vøtnum snýr seg um aling á byrgingum, sum eru gjørdar í sambandi við el-framleiðslu hjá SEV. Tvs., at umhvørvisspurningurin ikki á sama hátt hevur týdning, tí hesi økir longu eru ídnaðarøkir. Aling á byrgingum skal tó fylgja vanligu umhvørviseftiransingarskipanum, sum eru fyri aling. Umhvørviskanningar eru gjørdar av byrgingunum og tað er einki sum týður uppá, at byrgingarnar eru dálkaðar av aling.

Tá tað kom til sjúkufyribyrgjandi viðurskiftini var semja um, at um so er, at sjúka kemur í fiskin á byrgingunum, so skulu vanligar niðurberjingarreglur brúkast so sum sóttreinsing og brakklegging.

Landsstýrismaðurin í Vinnumálum legði síðan hetta mál fyri landsstýrisfund. Niðurstøðan á hesum fundi varð, at aling á byrgingum skuldi steðgast.

Føroya Havbúnaðarfelag hevur síðani samskift við Vinnumálaráðið um hetta mál og seinasta útspæli frá landsstýrismanninum í vinnumálum í 2007 var, at feløgini, sum fáast við aling á byrgingum, kunnu søkja um eitt niðurlagingartíðarskeið uppá trý ár, frá tí dagfesting, at loyvini ganga út. Havbúnaðarfelagið arbeiðir framvegis við hesum málinum.

Viðvíkjandi restini av endurskoðanini av alilóggávuni so var arbeiði komið væl áleiðis, tá val varð útskrivað fyri jól.

### 3.4 Aliráðstevna 2007

Í februar 2007 skipaði Havbúnaðarfelagið fyri eini ráðstevnu fyri starvsfólkum í alivinnuni og øðrum áhugaðum. Endamálið við hesum tiltakinum var at savna starvsfólk í alivinnuni til fyrilestrar og kjak. Á hesi ráðstevnini vóru bæði føroyskir og útlendskir fyrilestrarhaldarar. Føroysku fyrilestrarnir vórðu: Knud Simonsen frá Náttúruvísindadeildini, sum kunnaði um streymviðurskifti í Føroyum og aling. Granskarar á Fiskaaling greiddu frá granskingarverkætlanum, sum felagið ætlar at seta í gongd í 2007. Rúni Dam og Hans Jákup Mikkelsen høvdu fyrilestur um gongdina hjá alivinnuni og útlitini fyri 2008, og føroyskir alarar greiddu frá um ymiskar fóðringsstrategiir og úrslitini av teimum. Útlendsku fyrilestrarhaldararnar løgdu fram úrslit frá gransking innan smoltframleiðslu.

Á tiltakinum varð Andreas Reinert fyrrverandi stjóri á Fiskaaling og ein av slóðarunum fyri føroyskari alivinnu heiðraður av felagnum.

### 3.5 Samanbering av umhvørviseftiransingarskipanum í Føroyum, Noregi og Skotlandi

Føroya Havbúnaðarfelag tók í 2007 stig til at ein samanbering var gjørd av eftiransingarskipanunum í Føroyum, Noregi og Skotlandi. Endamálið var at finna út av um føroyska eftiransingarskipanin var samsvarandi skipanunum aðrastaðni og um grundarlag er fyri at endurskoða føroysku skipanina.

Samanumtikið kann sigast, at støðan í Føroyum í mun til hini londini er, at tann føroyska skipanin er góð. Skipanirnar líkjast nógv. Skotland er strangast á summum økjum og norðmenn hava tað lagaligastu skipanina, Føroyar liggur ímillum Norra og Skotland - hellur seg móti Norra. Í Føroyum verður kannað fyri zink og kobar, meðan norðmenn slett ikki kanna hesi evnir, í hvussu so er ikki í tí yvirvøku, sum alarin skal standa fyri at gera. Møguliga tekur eftirlitsmyndugleikin slíkar royndir, tá eftirlitsvitjanir eru.

Djóralívskanningar og Zink og Kobar er nakað, sum Havbúnaðarfelagið kann taka upp til viðgerðar saman við HFS. Felagið átti kanska at fingið savna tøl og komi við einum boðið uppá, hvussu stórur zinktrupulleikin er fyri vinnuna.

### 3.6 Uppafturtøka av dumpingmálinum av sílum

Føroya Havbúnaðarfelag og limir tess fingu í 2007 skriv frá ES um, at avgjørt er at taka dumpingákæruna ímóti norskum alarum um síl uppaftur. Norðmenn hava ynskt, at fingið málið tikið uppaftur nú, tí prísurin á sílum á ES marknaðinum hevur verið góður í 2006, og tí teir ynskja, at 2006 verður kanningartíðarskeiðið. ES vendir sær til okkara fyri at spyrja um føroyska alivinnan ynskir, at ákæran ímóti Føroyum eisini verður uppafturtikin. Hvør einstakur alari varð spurdur og kundi taka støðu í hesum málinum.

Føroyska alivinnan varð ákærd at hava dumpað síl á ES marknaðinum í 2002. Í 2003 varð niðurstøða gjørd, og føroysku feløgini vórðu dømd at gjalda strafftoll. Stutt eftir hetta gjørdu tvey feløg avtalu við ES um, at um so var, at tey hildu seg

omanfyri ein ásettan minstaprís, kundu tey selja síl á ES marknaðin uttan toll. Hini feløgini hava ikki hesa avtalu og mugu tí gjalda ásetta tollin, um tey útflyta síl til ES marknaðin. Í 2008 eru fimm ár síðani strafftollurin varð ásettur, og tá verður málið tikið uppaftur av ES, um tað ikki verður tikið upp nú. Tað merkir, at føroyska vinnan óansæð fær fyrispurning frá ES um endurskoðan av strafftollinum komandi ár.

Føroya Havbúnaðarfelag hevur verið á fundi við Løgmansskrivstovuna um sílamáli, fyri at kanna, um tey kunnu hjálpa vinnuni við at fáa avtikið tollin ella í øðrum lagi, at tey feløg, sum ikki kunnu selja til ES fyri minstaprís, kunnu gerast partur av hesi skipan. Svarið, sum vit hava fingið er, at vinnan má sjálv klára hetta mál. Um so er, at fleiri fyritøkur vilja hava møguleikan fyri at útflyta til ES, treyta av, at tey ikki fara niðurum minstaprísin, so mugu hesi feløg kannast av nýggjum.
Um Føroyar ikki tekur lut nú heldur strafftollurin fram til 2008, tá málið verður uppafturtikið. Um so verður, at Norra vinnur sakina, so hava føroysk síl framvegis strafftoll. Hvat hendir í 2008 er óvist. Avgerðin verður tá bygd á, hvat framleiðarar í ES siga um tollin í Føroyum. Um teir meta, at Føroyar ikki gera skaða í ES kann verða, at tollurin verður burturtikin. Um framleiðarar hinvegin siga, at Føroyar gera skaða, verður tollurin verandi.

Kostnaðurin av at gera kanningina var útgreinaður og staðfest varð, at tað er sera kostnaðarmikið at gera kanningina. Somleiðis er framleiðslan av sílum er sera lítil og í minking.

Sjálvt um Havbúnaðarfelagið ásannar, at tað er av alstórum týdningi at tiltøkini sum ES hevur sett, verða avtikin varð støða tikin um ikki at samstarva við ES um hetta mál, men at bíða til málið verður uppafturtikið í 2008. Orsøkin til støðu Havbúnaðarfelagsins er, at kostnaðurin av eini slíkari kanning ikki stendur mát við ta lítlu framleiðsluna vit hava av sílum.

## 3.7 Yvirvøkuætlan fyri fiskasjúkur

Nevndin í Havbúnaðarfelagnum gjørdi av í 2007 at arbeiða við at fáa yvirvøkuætlan fyri fiskasjúkur í Føroyum. Fundur hevur verið um hetta við Vinnumálaráðið og Heilsufrøðiligu Starvsstovuna. Hetta arbeiðið er komið í drag orsaka av manglandi arbeiðsorku í Vinnumálaráðnum. Nevndin í Havbúnaðarfelagnum er sannførd um at tað hevur stóran týdning at fáa staðfest sjúkustatus í Føroyum. Hetta fyri at umganga at Føroyar kunnu taka ímóti fiski og rognum frá londum, sum eins og vit hava lægsta sjúkustatus. Somuleiðis vil ein staðfesting av sjúkustatus í Føroyum vónandi geva vinnuni møguleikar at útflyta t.d. smolt.

## 3.8 Altjóða samstarv

### *3.8.1 FEAP*

Havbúnaðarfelagið hevur verið limur í FEAP (Federation European Aquaculture Producers) seinastu nógvu árini. Nevndin gjørdi í 2007 av, at Havbúnaðarfelagið skuldi brúka limaskapin í FEAP meira aktivt og at onkur í nevndini umframt samskiparin skulu luttaka á FEAP fundum. Í 2007 hava formaðurin og samskiparin verið á fundi í FEAP og ætlanir eru um at luttaka aktivt í 2008 eisini. Tá ein tíð er farin verður eftirmett, fyri at fáa gjørda eina meting av, hvat vit fáa burturúr limaskapinum.

Føroya Havbúnaðarfelag hevur bjóðað seg til at verða fyriskipaðari av aðalfundinum í FEAP á várið 2009. Hetta er síðani avgjørt í FEAP. Tað merkir, at formenn, nevnd og leiðsla fyri flest øll alarafeløg í Evropa kom til Føroyar í samband við fundin.

### *3.8.2 ISFA*

Havbúnaðarfelagið hevur fingið innbjóðing um at luttaka í ISFA (International Salmon Farmers Assosiation). Nýtt lív er blást í felagið og ætlanin er, at størstu alilondini skulu skiftast um at hava skrivstovuna hjá felagnum. Nevndin í

Havbúnaðarfelagnum metir ikki, at felagið skal brúka orku uppá ISFA-luttøku, tí avmarkað er hvat felagið kann luttaka í. Avgjørt er, at orkan skal brúkast í FEAP í staðin.

## 3.9 Útbúgving og skeið

Havbúnaðarfelagið hevur lagt nakað av orku í at kanna, á hvønn hátt felagið kann arbeiða fyri at fáa hækkað útbúgvingarstøðið í alivinnuni. Umrøtt hevur verið at skipa fyri leiðsluútbúgving fyri leiðarum í alivinnuni, men hetta er slept, orsaka av, at mett verður ikki,at tað er grundarlag fyri at skipa fyri eini útbúgving til leiðslustarvsfólk í alivinnuni burturav. Leiðarar í alivinnuni mugu taka eftirútbúgving saman við øðrum, var niðurstøðan.

Nevndin í Havbúnaðarfelagnum er sannførd um at tað er eina av uppgávunum hjá felagnum at skipa fyri skeiðum fyri starvsfólki í vinnuni.

### *3.9.1 Skeið viðvíkjandi arbeiðstrygd*

Havbúnaðarfelagið hevur skipað fyri einum skeiði innan arbeiðstrygd. Undirvísarar vóru frá Arbeiðseftirlitinum og Skipaeftirlitinum. 25 fólk frá alivinnuni vóru á skeinum.

## 3.10 Oljudálking frá Olshanu

Í sambandi við at trolarin Olshana fór á land á flejsunum í heyst og olja lak úr skipinum og inn á alibrúk á sundalagnum og Kaldbaksfirði, varð Havbúnaðarfelagið inndrigið í ætlanirnar um at fáa arbeiðið í gongd um at fáa gjørt oljusperrur, sum kunnu hongjast uppá alibrúk um so er, at dálking verður aftur av olju. Eftir intiativi frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fór Pauli Einarson í gongd við at gera eina prototypu av gardinum at hongja uppá aliringar. Pauli Einarson og Bergur Andreassen frá Tíggjará vegna Havbúnaðarfelagið, arbeiða við hesum. Seglvirkið í Klaksvík gjørdi gardinurnar og eru hesar royndar á einum alibrúki.

Í sambandi við sama mál heitti Havbúnaðarfelagið á táverandi Innlendismálaráðið um at bera so í bandi, at oljan verður tikin upp úr skipinum, soleiðis at vandin fyri at alifiskur verður dálkaður verður munandi minni.

### 3.11 Avtalan um sjúkurakt alibrúk

Avtalan millum Føroya Arbeiðsgevarafelag (FAG) og Føroya Arbeiðarafelag (FA) um sjúkurakt alibrúk gekk út 1. oktober 2007. Í hesum sambandi segði FAG avtaluna upp og bað um samráðingar og í tí sambandi um fund við FA um avtaluna. Fundur fekst ikki í lag, tí FA vildi ikki gera broytingar í avtaluni. Sama avtala, sum hevur verið í gildi seinastu trý árini var tí undirskrivað í heyst.

### 3.12 Landsdjóralæknaembætið

Vinnumálaráðið hevur ætlanir um at flyta Landsdjóralæknaembætið úr Vinnumálaráðnum til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna. Hetta var partur av upprunaliga ætlanin, tá bygnaðarbroytingar vórðu gjørdar í miðfyrisitingini, sum var gjørd fyri umleið 10 árum síðan.

Hetta er líknandi skipan, sum er í m.a. danska Fødevarestyrelsen har landsdjóralæknaembætið liggur í eini deild fyri seg. At lóggávuøkið innan vetriner viðurskifti verður lagd á HFS er ikki heilt í samsvar við intensjónirnar um, at lóggávusmíð skal verða í sjálvum aðalráðnum. Men orsaka av, at vetriner viðurskifti og lóggáva innan øki er so krevjandi verður mett, at økið má skipast soleiðis fyri at fáast at virka.

Havbúnaðarfelagið hevur víst á, at tað er sera umráðandi at ansað verður eftir, at lóggávuparturin og eftirlitsparturin ikki verða ov samantvinnað og *ad hoc* lóggáva spyrst burturúr. Somuleiðis, at kærumøguleikin, sum higartil hevur ligið hjá landsdjóralæknanum ikki verður tann sami. Vinnumálaráðið hevur lagt lógaruppskot fyri Løgtingið um vinnukærunevnd, sum í framtíðini fer at taka sær av hesi uppgávuni. Ætlanin er at serkøn fólk vera knýtt at hesi nevnd, sum hava førleikar innan ymisku økini vinnukærunevndin er kærunevnd fyri.

## 3.13 Lóggáva sum ávirkar alivinnuna

### *3.13.1 Rakstrarkunngerðin*

Nógv umtalaða rakstrarkunngerðin er ikki liðugt endurskoðað enn. Havbúnaðarfelagið hevði roknað við, at kunngerðin fór at vera lýst í 2007, men so var ikki. Roknað verður tó við, at kunngerðin fer at koma í 2008.

### *3.13.2 Kunngerð um merking av alibrúkum*

Havbúnaðarfelagið hevur havt kunngerð um merking av alibrúkum til hoyringar. Felagið hevði fleiri viðmerkingar til kunngerðina, m.a. at leingja frástøðuna millum ljós á alibrúkum frá 80 til 150 m og metir, at ásetingar um fleiri endurskin heldur eiga at verða gjørdar.

## 3.14 Gransking og alivinna

Nevndin í Havbúnaðarfelagnum hevur samskift við Fiskaaling um tær ætlanir Fiskaaling hevur um gransking innan alivinnu framyvir. Fiskaaling hevur valt at steðga við kynbótaarbeiðnum, tí føroyska vinnan hevur sagt frá, at vinnan keypir rogn frá mest kappingarføra framleiðaranum av rognum. Somuleiðis, at Fiskaaling fer at leggja dent á gransking og menning innan alivinnu framyvir. Fiskaaling hevur sett fólk í starv, sum hava førleikar innan góðsku á laksi, havfrøði, toskaaling og gentøkni. Føroya Havbúnaðarfelag samskiftir við leiðsluna í Fiskaaling við tí endamálið at tann gransking, sum fer fram er so vinnurættað sum gjørligt.